# Barnaheimið søkir eftir leiðara og starvsfólkum

**Til familjudeildina og smábarnadeildina, sum latnar verða upp í summar, søkir Føroya Barnaheim eftir ellivu starvsfólkum umframt leiðara til stovnin**

BARNAHEIMIÐ
*Turið Kjølbro*

Í lýsing í bløðunum í dag søkir stýrið fyri Føroya Barnaheim eftir leiðara og 11 starvsfólkum.

Í summar verður sett á stovn ein familjudeild, har foreldur og børn kunnu búgva í styttri tíðarskeið. Roknað verður við, at upp til fýra familjur kunnu vera á deildini í senn. Endamálið við uppihaldinum er at fáa greiði á, hvørja styrki og hvørjar trupulleikar, familjan hevur, og hvussu hon best kann stuðlast framyvir. Somuleiðis er endamálið, at foreldrini verða styrkt og stuðlað í tí at vera foreldur, og at familjan sum heild verður hjálpt at koma í betri menning.

Eisini verður nýggj smábarnadeild latin upp í næstum, sum skal taka ímóti børnum í aldrinum 0 til 12 ár. Umframt at taka ímóti børnum, sum hava bráðfeingis tørv á einum uppihaldsstað, er deildin ætlað til styttri eygleiðingaruppgávur. Endamálið við hesum er fyrst og fremst at geva barnaverndini, ið innskrivar barnið á Barnaheimið, betri møguleikar at meta um menning barnsins og møguligan tørv á framhaldandi hjálpartiltøkum.

Tey tíggju størvini eru ætlað familjudeildini, meðan tað eina starvið er til ungdómsdeildina sum er. Eina starvið á familjudeildini er hálvtíðarstarv.

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur, sum í løtuni hevur 6-7 børn á ungdómsdeildini og 7 starvsfólk. Verandi leiðari er fyribilssettur. Við umsorgan, eygleiðing og viðgerð skal Barnaheimið virka fyri at skapa trygg og mennandi kor fyri børn, ung og foreldur, meðan tey eru á heiminum. Hetta skal gerast í tøttum samstarvi við familjuna, barnavernd, stovnar og fakfólk annars við tí endamáli at geva innskrivandi barnavernd betri møguleikar at meta um støðuna hjá barninum familjuni og møgulig framhaldandi hjálpartiltøk.



Freistin at søkja leiðarastarvið, sum skal setast 1. juli, er úti 27. mai, og freistin til hini 11 størvini er úti 3. juni.

# Leiku liva, Fívil og Tsatsiki

**Tríggjar nýggjar barnabøkur til tríggjar aldursbólkar eru komnar út**

ÚTGÁVUR

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tríggjar barnabøkur, smábarnabókina Hvussu er veðrið, Fívil eftir David McKee, barnabókina Leiku liva, og stuttleika sær eftir Liss Joan Hansen, sum Kristina Tausen myndprýddi, og barnabókina Bara Tsatsiki eftir Moni Nilsson-Brännström, sum Bergur Rasmussen týddi.

Bókin Hvussu er veðrið, Fívil? er væl egnað til 0-2 ára gomul børn. Fívil er fittasti fílur í verðini – og tann einasti, ið er sum eitt klútateppi. Fívli dámar væl at vera úti, og í hesi bókini síggja vit Fívil í vindi, regni, toru og kava. Men allarbest dámar Fívil sólina. Bókin er 16 bls. í litum, prentað á haldgott papp. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

Hvussu er veðrið, Fívil? kostar kr. 49 í bókahandlunum.

Beint fyri jól kom út bókin: Leiku liva, tá eingin sær. Í tí bókini hittu vit Vættraper, Músapól og Dunnuanton, Brummibjarna og Apukarl. Hetta vóru leikuni hjá Torkili, sum býr í Funningsfirði.

Her kemur so onnur bókin í røðini um leikuni, sum liva, tá ið eingin sær. Í hesi bókini stuttleika leikuni sær ófført, og tey fáa eisini ein nýggjan vin. Tá ið tey einaferð eru í Gøtu og vitja ommu Torkil, hitta tey Nikkolinu. Leikuni spæla, gera sær mat, og liva annars við í tí, sum Torkil og tey gera ymsar tíðir á árinum, á nýggjárinum, føstulávint, á páskum og um heystið. 8 kapitlar eru í bókini.

Leiku liva og stuttleika sær er 72 bls. innbundin. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

Bókin, sum er væl egnað at lesa upp fyri 3-7 ára gomlum børnum, kostar kr. 95 í bókahandlunum.

Í 2001 gav Bókadeildin út fyrstu og aðru bókina í røðini av fýra um smádrongin Tsatsiki, og í ár koma so hinar báðar.

Í triðju bókini, sum eitur Bara Tsatsiki, fer Tsatsiki í triðja flokk, og nú hevur hann bæði mammu og pápa. Nei, bíða, hann hevur tveir pápar, Gøran við hús og Pápa hegguslokkafiskara í Grikkalandi. Orkestrið hjá Tsatsiki og Per Hammar er væl umtókt í skúlanum, og við kærleikanum gongur eisini strálandi, tí bæði Maria Grynwall og Sára vilja báðar ganga saman við Tsatsiki, og hann veit ikki síni livandi ráð, hvørja hann skal velja sær. Og meðan hinir dreingirnir fyrst og fremst velja fótbóltin sum frítíðarítriv, hevur Tsatsiki valt skeykdansin.

Bara Tsatsiki er 140 bls., heft. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

Bókin, sum er væl egnað til 8-12 ára gomul børn, kostar kr. 125 í bókahandlunum.




# Eivindarmál Eivindi til heiðurs

**Føroya Fróðskaparfelag hevur givið út nýggja bók við fjølbroyttum innihaldi**

ÚTGÁVA

Eivindarmál eitur nýkomin bók frá Føroya Fróðskaparsetri. Hetta er heiðursrit til Eivind Weyhe, lektara á Fróðskaparsetrinum, á seksti ára degi hansara 25. apríl við heilsanum og greinum frá starvsfeløgunum og vinum víða hvar.

Innihaldið í bókini er ógvuliga fjølbroytt, men meginparturin er av málfrøðiligum slag og endurspeglar tey ymsu áhugaøkini hjá Eivindi Weyhe: navnagransking, mállæru, málførafrøði, kvæði og tættir, ljóðføri og málsøgu. Men eisini onnur øki eru umboðað, t.d. upprunafrøði, orðabókafrøði og talumál. Við eru eisini greinir, sum snúgva seg um annað, t.d. siðsøgu, bókmentir og hugleiðingar. Av teimum 39 greinunum í bókini eru 15 skrivaðar á føroyskum, 8 á norskum, 6 á donskum, 5 á svenskum, 3 á íslendskum og 2 á enskum.

Stigið til útgávuna tók Føroyamálsdeildin, har Eivind Weyhe hevur sítt dagliga starv. Tey, ið ritstjórnað hava, eru fýra starvsfelagar hansara á deildini: Anfinnur Johansen, Jógvan í Lon Jacobsen, Zakaris S. Hansen og Malan Marnersdóttir.

Eivindarmál – við einari síðu úr kvæðahandriti Sjóvarbóndans eldra á permuni – er heilar 385 bls. og prentað á Dimmalætting. Hon er 32. bók í røðini frá Føroya Fróðskaparfelag við heitinum Supplementa til Fróðskaparrit.

Stuðlað útgávuni hava Føroya Banki, Tórshavnar kommuna, Málting, Mentunargrunnur Landsins og Vágs kommuna. Bókin fæst í bókasølunum og kostar 330 krónur.




# Føroyingar, íslendingar og grønlendingar hittast

**Á mentunarstevnu í Keypmannahavn seint í mai, verður ljóskastarin settur á list og mentan í Føroyum, Grønlandi og Íslandi**

MENTANARSTEVNA
*Turið Kjølbro*

Í døgunum 23. til 26. mai verður mentunarstevna í Keypmannahavn, Nordatlantisk Kulturfestival, sum Føroyahúsið, Grønlendingahúsið og Jónshús, Íslendska Mentanarhúsið í Keypmannahavn skipa fyri. Á stevnuni verða nógv tiltøk. Tey verða ymsa staðni í danska høvuðsstaðnum, men tey flestu í Huset í Magstræde.

Listafólk og fólk úr mentunarlívinum í Føroyum, Íslandi og Grønlandi taka lut. Á skránni eru eitt nú nútíðarlist og bókmentir, filmir og sjónleikur, tónleikur, sangur og dansur, fólkslig mentan, matmentan og mangt, mangt annað.

Vigdís Finnbogadóttir, fyrrverandi íslendskur forseti, letur stevnuna upp. Undir tiltakinum verður grønlendskur trummudansur, føroyskur dansur, sangur og tónleikur.

Millum luttakararnar úr Føroyum kunnu vit nevna Maluna Thomsen kvintet, kabarett við Eyðuni Johannesen og fleiri, filmin Bye Bye Bluebird, kappróður, kórsang við eitt nú Húsakórinum, vísusang við Hanusi G. Johansen, og mín sann seyð og gæs úr Føroyum. Allar dagar verður møguleiki at keypa føroyskan, íslendskan og grønlendskan mat, og síggja ymsar framsýningar, eitt nú meðan Henning Thomsen arbeiðir við træ, Hanus Jensen smíðar bát og Nicolina Jensen Bedder arbeiðir við ull. Somuleiðis er frímerkjaframsýning.



UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## DONG keypir Statoil út

Danska orkufelagið DONG roynir nú at yvirtaka operatørloyvið hjá norska Statoil á trimum donskum oljuleiðum í Norðsjónum. Feløgini vilja ikki gera nakrar viðmerkingar til tíðindini, og sambært Berlingske Tidende hava bæði feløgini gjørt alt fyri at halda ætlanina loyniliga.

Eftir ætlanini skal Statoil taka seg aftur av donsku oljuleiðunum Siri, Lulita og Stine Segment 2, sum allar eru har norðuri í danska partinum av Norðsjónum. Tá feløgini hava hildið samráðingarnar loyniligar, er einki likið út um, hvat Statoil skal hava aftur fyri tey trý loyvini, men ein talsmaður hjá Statoil segði tó fyri danska útvarpinum sunnudagin, at talan er um eina milliardaupphædd.

Tá Statoil er farið av teimum trimum leiðunum, eigur DONG millum 62 og 68 prosent av teimum. Leiðirnar verða mettar sum nakrar av teimum av teimum týdningarmestu í danska partinum av Norðsjónum.

**KT-feløg afturgongd**

Tað gongur illa hjá teimum stóru KT-fyritøkunum í Noregi. Ein uppgerð fyri tann fyrsta ársfjórðingin í ár vísir stóra afturgongd hjá teimum 18 KT-fyritøkunum, sum eru skrásettar á norska virðisbrævamarknaðinum.

Samanborið við úrslitið fyrsta ársfjórðing í fjør var inntøkan hjá fyritøkunum meiri enn 350 mió. krónur minni tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í ár, og umsetningurin var 1,3 mia. krónur minni.

Gongdin hjá fyritøkunum sæst eisini aftur á partabrævavirðinum. Í fjør fall virðið á partabrøvunum í teimum 18 fyritøkunum 35 prosent, og síðani 1. januar í ár er virðið fallið 16 prosent afturat.

# Eitt rungandi "NON"


*Jacques Chirac fekk meiri enn 82 prosent av atkvøðunum sunnudagin. Undirtøkan var tó meiri eitt tekin um mótstøðuna ímóti mótvalevninum Jean-Marie Le Pen*

Mynd: Reuters

**Um alt Vesturevropa fegnast politiskir leiðarar um úrslitið av franska forsetavalinum sunnudagin**

FRAKLAND
*Árni Joensen*

At sitandi franski forsetin, Jacques Chirac, fekk meiri enn 82 prosent av atkvøðunum á seinna valumfarinum sunnudagin sigur ikki so nógv um, hvønn stuðul hann veruliga hevur millum franska fólkið. Úrslitið var heldur ein staðfesting av, at franska fólkið vil ikki vita av teimum víðgongdu sjónarmiðunum hjá mótvalevni hansara, Jean-Marie Le Pen.

Undan valumfarinum sunnudagin spáddu summar veljarakanningar, at Le Pen kundi fáa eini 25 prosent av atkvøðunum, og sjálvur setti hann alt upp á spæl, tá hann segði, at hann fór at meta tað sum ein ósigur, fekk hann minni enn 30 prosent. Tað var tí ikki so løgið, at hýrurin á Le Pen og viðhaldsfólki hansara var í botni, tá tað vísti seg, at hann bert hevði fingið góð 17 prosent ella lítið meiri, enn hann fekk í fyrra valumfarinum.

Franskir fjølmiðlar vóru í gjár á einum máli um, at Le Pen og flokkur hansara Front National høvdu fingið eitt rungandi "NON" frá fronsku veljarunum.

**Fegnast um úrslitið**

Politiskir leiðarar uttan fyri Frakland vóru skjótir at ynskja Jacques Chirac tillukku við sigrinum og afturvalinum, men allir sum ein løgdu teir dent á, at úrslitið samstundis var eitt nei til tey víðgongdu sjónarmiðini hjá Le Pen.

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, var millum teir fyrstu at gera viðmerkingar til franska valúrslitið. Powell segði seg fegnast um, at fronsku veljararnir høvdu víst sjónarmiðunum hjá Le Pen frá sær. Tað sama gjørdi bretski forsætisráðharrin, Tony Blair.

- Úrslitið er ein sigur fyri demokratiið og ein ósigur fyri tann víðgongda og stoytandi politikkin, sum Le Pen umboðar. Eg gleði meg til at samstarva við Chirac og at víðka tað samstarv, sum vit longu hava, segði Tony Blair.

Týski samveldiskanslarin, Gerhard Schrøder, var eisini fegin um úrslitið í Fraklandi.

- Franska fólkið hevur uttan himpr víst tí víðgongda frá sær, segði Schrøder.

# Danir vilja hava evruna ístaðin fyri krónuna

**57 prosent av donsku veljarunum taka undir við, at evran verður sett í gildi sum danskt gjaldoyra**

DANMARK
*Árni Joensen*

Ein meiningakanning, sum danska blaðið Børsen almannakunngjørdi í gjár, vísir, at 57 prosent av teimum spurdu dønunum taka undir við, at evran verður sett í gildi sum gjaldoyra ístaðin fyri krónuna.

Kanningin vísir samstundis, at bara 35 prosent eru ímóti, og so lítil hevur mótstøðan ongantíð verið, síðani danir á fólkaatkvøðu tann 28. september í 2000 søgdu nei til at seta evruna í gildi. Átta prosent ivast í, hvat tey høvdu svarað.

Eisini avdúkar kanningin, at mong av teimum, sum fyri hálvum øðrum ári síðani vóru serliga hart ímóti felags gjaldoyranum, hava broytt støðu. Talan er um tey lágløntu, kvinnurnar og pensjonistarnar.

Danska stjórnin hevur ikki viljað sagt nakað um, nær spurningurin um evruna aftur verður lagdur fyri fólkið. Bæði núverandi stjórnin og tann undanfarna hjá Poul Nyrup Rasmussen hava alla tíðina sagt, at málið verður ikki lagt fyri fólkið aftur, fyrr enn vissa er fingin fyri, at svarið verður ja.

Fyrrverandi uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, segði við Børsen í gjár, at eftir hansara tykki eigur stjórnin at skipa fyri fólkaatkvøðuni næsta ár. Hann heldur, at evran hevur víst seg at rigga væl, og at danir sambært kanningini fegnir vilja taka lut í felags gjaldoyranum.

Úr Norðurlondum:

## Nýggj pass

Donsku myndugleikarnir hava gjørt av, at danir skulu hava nýtt pass, tí tað hevur víst seg, at verandi pass er alt ov lætt at eftirgera.

Danir fingu annars nýtt pass í 1997, og tá var orsøkin júst tann, at tað gamla passið var ov lætt at eftirgera. Tá varð sagt, at tað bar ikki til at eftirgera tað nýggja passið, men danska løgreglan hevur seinastu árini fleiri ferðir avdúkað, at menn hava gjørt donsk pass. Samstundis hevur tað víst seg, at nógvir danir missa passið burtur.

Myndugleikarnir hava tí gjørt av at gera eitt nýtt pass, sum ætlandi kemur í gildi 1. januar í 2005.

**Afturvaldur**

Tann 55 ára gamli formaðurin í norska Høgra-flokkinum, uttanríkisráðharrin Jan Petersen, varð afturvaldur, tá flokkurin helt landsfund um vikuskiftið. Tveir aðrir ráðharrar, Erna Solberg og Per-Kristian Foss, vórðu vald sum 1. og 2. næstformaður. Við hesum er øll floksstjórnin mannað av stjórnar- og tinglimum. Annars plagar ein kommunalpoltikari at sita í floksleiðsluni, men hesaferð varð vikið frá hesum.

**Búgva heima**

Ein kanning í Svøríki vísir, at nógv svensk ungfólk verða búgvandi heima hjá foreldrunum, eftir at tey eru farin upp um tey 20. Kanningin, sum umfataði fólk millum 20 og 23 ár, vísir, at triði hvør svii í hesum aldursbólkinum býr heima hjá foreldrunum.

Ein tilsvarandi kanning fyri tveimum árum síðani vísti, at tá búði fjórði hvør svii millum 20 og 23 ár heima hjá foreldrunum. Bæði tann fyrra og tann sinna kanningin vísa, at verður aldursmarkið sett til 27 ár, eru tey flestu flutt í egnan bústað.